VIÐMERKINGAR

# Áheitan á Miðflokkin

Jógvan í Løðuni

Loyvi mær hervið at heita á tykkum, ið standa fyri Miðflokkinum, um ikki, í hesum hjálpartíðum, at koma fram aftur við politiska hugskotinum um at peningur, latin til samkomur og vælgerandi endamál, skal kunna dragast frá í skatti.

Onkur partur av føroyska fólkasálini má vera frítikin fyri stemmuspekulatión.

Tað er gott at fólk kunnu lata eftir førimuni í tí stilla.



# Serfrøðingar, journalistar og yvirskriftir

Magni Laksáfoss

*Í tíðindaflutninginum í dag, fokusera journalistar alt ov nógv uppá at fáa eina sensationella yvirskrift og alt ov lítið uppá at yvirskriftin skal umboða innihaldið. Hetta ger, at boðskapurin hjá serfrøðingum kemur illa fram og ofta "druknar" í yvirskriftini.*



Í eini hvørjari samrøðu við annan persón, er møguleiki fyri at verða skeivt endurgivin. Hetta er sjálvsagt eisini galdandi tá serfrøðingar (ella fólk ið roknast hava serligt innlit) velja at lata seg interviewa.

Ein størri trupuleiki er, eftir míni fatan, at journalistar skulu "selja" sín miðil. Tí leita teir eftir eini sensationellari yvirskrift, sum fær fólk at vakna. Trupulleikin er, at ofta lesa fólk einans yvirskriftina og ikki alla greinina, tí hevur tað stóran týdning at yvirskriftin ber rætta boðskapin.

Serfrøðingar eru lærdir at analysera støðuna, finna møguligar trupuleikar við støðuni, og finna loysnir uppá trupuleikarnar. Tað av hesum sum selur best fyri ein jounalist, er hvørki analysan ella loysnirnar, men harafturímóti trupulleikarnir. Journalistar dáma tí best at hefta seg við trupulleikan og finna yvirskriftina har.

**"Eldrabumba hóttir!"**

Eitt dømi frá mær sjálvum um tílíka yvirskrift er, tá eg hevði gjørt eina framskriving av fólkatalinum í Føroyum. Hon vísti, at við verandi burðartíttleika, deyðstíttleika og flytimynstri vilja stóru broytingarnar í fólkatalinum verða, at talið av eldri fólkum fer at vaksa munandi. Loysnin á hesum má vera, at seta fleiri ressoursir inn á eldraøkið, økja pensiónsuppsparingarnar og byggja fleiri ellis- og røktarheim og sambýlir.

Journalisturin helt óiva, at trupuleikin var meiri áhugaverdur enn loysnirnar, tí tá blaðið kom út var yvirskriftin á forsíðuni á blaðnum "Eldrabumba hóttir!"

Hóast greinin í sjálvum sær var rímiliga væl skrivað og endurgav nøkurlunda boðskapin, stóð yvirskriftin eftir: "Eldrabumba hóttir!"

**"Farvæl til luksus!"**

Eitt annað dømi hendi rættiliga nýliga. Ein journalistur ringir til mín kl. 12.45 ein gerandisdag. Tíðindini á middegi vóru júst liðug. Hann spyr um eg kann hjálpa honum at skilja nýggjastu innflutningstølini frá Hagstovu Føroya. Hann skilur ikki hví innflutningurin ikki minkar meiri, nú afturgongd er í búskapinum.

Eg sigi at eg ikki havi sæð tølini, men at vanliga mynstrið er, at íløguvørurnar minka fyrst (íløguvørur eru t.d. maskinur, byggitilfar, bilar o.l.). Næst eftir, ella samstundis sum íløguvørurnar minka, minka eisini luksusvørurnar (t.d. hvítvørur, stereoannlegg, sjónvørp o.l.). At enda minka aðrar vørur so sum matvørur, men tá plagar afturgongdin at hava vart leingi áðrenn hesar vørurnar minka.

Hann sigur, at hann nú betur skilir tølini, tí tað mynstrið, sum eg havi greitt frá, sær hann aftur í tølunum. Eftir hetta tosa vit eitt sindur afturat um búskaparstøðuna og um hvussu stór afturgongdin sær út til at blíva. Samrøðan varir tilsamans umleið 10 minuttir.

Klokkan fýra sama dag kemur blaðið út (einans tríggir tímar eftir at eg havi tosað við journalistin) yvirskriftin á forsíðuni er: "Farvæl til luksus!" — var hatta mín boðskapur???

Sjálv greinin var rímiliga góð og hevði mín boðskap í sær, men eg haldi ikki at yvirskriftin var góð, um man skal meta út frá um boðskapurin er rætt endurgivin.

## Eisini nærlagdir journalistar

Bæði dømini eg havi tikið her, eru tikin frá Sosialinum. Eg skal tó beinanvegin skunda mær at siga frá, at eg eisini havi upplivað líknandi tilburðir frá øðrum miðlum.

Eisini kenni eg nógv dømir frá øðrum serfrøðingum, sum eisini hava upplivað líknandi tilburðir, og sum nú siga seg aftra seg við at úttala seg til miðlarnar, tí boðskapurin verður skeivt endurgivin.

Eg vil tó leggja afturat, at tað finnast fleiri nærlagdir jounalistar, sum leggja seg eftir at endurgeva serfrøðingarnar rætt. Fyri at nevna eitt navn, vil eg nevna Áka Bertholdsen frá Sosialinum, sum eftir míni fatan er ein góður nærlagdur journalistur.

Í teimum samrøðum eg havi havt við Áka, hevur hann megnað at fanga boðskapin væl, og hevur endurgivið meg uttan feilir, ið eru verdir at nevna. Fyri hetta hevur hann rós uppiborið.

Eg vil enda við at siga, at um ein jounalistur hevði havt skrivað hesa greinina, hevði hann helst ikki havt valt yvirskriftina "Serfrøðingar, journalistar og yvirskriftir", men heldur havt yvirskriftina "hong serfrøðingin!"

# Avhøvda Framtaksgrunnin, so er Suðuroyggin bjargað

Finnleif Guttesen



Hetta er niðurlagi, tá ið tú hoyrir løgtingsmenn og onnur úttala seg um tað stóra arbeiðsloysi í Suðuroy

**Hví rópa teir ikki fyrr enn nú?**

Veruleikin er tann, at løgtingsmenn úr Suðuroy vilja finna ein syndabukk fyri at fjala yvir, at teir hava ikki rætt hond frá síðu tey seinastu 12 árini, fyri at fáa nýggj arbeiðspláss til Suðuroynna og harvið steðga fólka- fráflytingini.

Støðan í dag er einki eindømi, hetta hevur verið gongdin tey seinastu 12 árini og tá ið onkur ljósglotti hevur verði við arbeiði, ja, so hevur tað verði, sum Kristian Matras Kristiansen skrivar í Sosialinum. ***Tað er sum at míga í brøkurnar, tað vermir eina løtu, men tá ylurin er kólnaður, byrja beinini at frysta hvaðna verri.***

**Dirvi og vilji manglar**

Tað er bert ein sjónleikur fyri veljarunum, nú løgtingsmenninir rópa upp, tí higartil hava teir ikki haft dirvi ella vilja til at gjørt nakað, og tað er uttan mun til politiskan lit. Tað er ikki nýtt ferðamannaskip, keiðir ella tunlar, sum geva varandi arbeiðspláss.

Teir brúka undanførslur, so sum at spyrja kommunur um, hvar skúlar, sum landið hevur alla ábyrgd av, skulu byggjast. Hetta blívur bert gjørt fyri at gruggað og útseta mál, sum teir ikki hava dirvi til at taka avgerðir í.

**Hvat vilja suðuroyingar?**

Hendan spurningin skuldu tingmenn, kommunalpolitikarar og onnur, serliga á Tvøroyri og í Vági, spurt seg sjálvan um.

Vilja teir halda fram við, at oyggin skal verða sum Kypern, deild sundur í tvey, ja, so koma vit ikki víðari, og sum eg havi sanna, so sleppa vit ikki undan hesari tankagongd í bræði, serliga í Vági og á Tvøroyri.

So, um verandi samgonga meinar nakað sum helst við at stuðla Suðuroynni, so leggja teir alt alment byggjarí í Hov`s dali, tað verið seg:

- Studentaskúli
- Almenna og Heilsuskúla
- Sjúkrasystursúla
- Nængingaheim
- Heilsufrøðiliga starvstovuna
- Strandferðsluna

**Kypern syndromi**

Tað kann væl ikki verða nakar ivi um, at allar kommunur við einari lagaligari fígging taka undir við, at eitt nýt ellisheim verður bygt í Vági, til frama fyri okkara eldru og fyri nýggj arbeiðspláss í Suðuroy.-

Ella er "Kypern syndromi" so sterkt, at einki kemur burturúr?

Livst so spyrst.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.